– trygt og ómakaleyst til hús



# Ein perla í náttúru-vøkrum umhvørvi

**Frálíka húsið er eitt valaverk, tá ið talan er um stað, arkitektur, tilfar og handverk. Útsýnið og livimøguleikarnir eru heilt einastandandi – og býbussurin koyrir beint til Havnar.**









## Fyrsta fatanin – uttanfyri og uttanum

Tú koyrir inn í snøgga túnið, har nóg mikið av parkeringsplássi er, og har alt er lagt við flísum, beton og asfalt. Tú gongur upp trappurnar til íbúðina / bústaðin í erva og sera snøgga útigólvið / terassuna við goymslurúmi við plássi til grillina og hjalli við plássi til matin. Her er sum ein heil hacienda, har kanst tú liva úti sum í suðurlondum, tá ið veðrið er til tað, tí útigólvið vendir rætt fyri sólini og er væl vart móti lotinum, so tú kanst njóta hvørja løtu beint uttan fyri dyrnar í fulkomnum friði.

## Ljós og luft

Ljósið uttan gongur aftur í innrættingini innan. Tú fært ljosið við tær, tá ið tú hyggur ígjøgnum stóru vindeyguni, ið venda suðureftir og eystureftir, og hevur sólina í ryggin, so tú sært suður gjøgnum allan fjørðin og yvir á Eysturoyarlandið, Streymoyarlandið og suður á Nólsoynna. Panoramaútsýnið yvir fjørðin og landslagið er heilt einastandandi. Her er djóralív og nógv skipaferðsla at síggja og fuglaljóð at hoyra, tí tú ert – hóast í bygdum øki – mitt í náttúruni. Býbussurin til Havnar steðgar nakrar fáar metrar frá, so eingin trupulleiki er at koma aftur og fram til "stórbýin", men búgva í barnavinaliga umhvørvinum "úti á landinum". Húsini standa væl fyri í náttúruvøkrum, friðarligum, veðurgóðum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg, og dagstovnur, skúli, ítróttarhøll og handil er í bygdini.

## Stílur og snið

Húsið er sera væl bygt og sum spildur nýtt – ein sonn handverkaraperla. Her hevur meistarligi handverkarin bygt sær sjálvum eini heilt serstøk hús, ið neyvan hevur sín maka til góðsku og dygd. Her er ikki spart uppá tilfar og handverkaratímar. Húsini eru heimlig og hava ein innbygdan hugna, og tú kennir teg tryggan fyri vetursins náttúrukreftunum. Alt er sera snotiligt og snøgt, haldbært og lætt at halda. Húsini eru bygd til at liva og virka í, og tola eitt sindur av hvørjum. Stóra, ljósa og snøgga rúmið í ovastu hædd kann brúkast, júst sum tað er, men kann eisini væl innrættast og brúkast til mangt og hvat.

## Innrætting

Í niðaru hædd er hjallur, stórt útigólv / terassa, goymslurúm, inngongd, durur, bryggers / vaskirúm, gesta-wc, hall, matarkøkur / alrúm, borðsstova / stova við útgongd til útigólv / altan, hjúnarrúm, stórt baðirúm og 3 kømur. Í ovaru hædd er stórt høli á 82 m2 við útgongd til altan / útigólv, ið kann býtast upp í fleiri smærri rúm. Betondekk er millum niðaru og niðastu hædd.

## Fakta

**Adressa** ...........Brekkutún 5, Kollafj.
**Byggiár:** ...........1993 / 2009
**Hæddir:** 2 tær ovastu hæddirnar
**Gólvvídd:**..........270 $m^2$
**Grundøki:**.........244 $m^2$
**Hjallur:** .............Ja
**Prísuppskot:** ...kr. 1.900.000









PF inni
Niels Finsensgøta 37
Postboks 364
FO-110 Tórshavn
Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**